# Betri tilbúgving

Í Grønlandi tekur Jonathan Motzfeldt, landstingsformaður, undir við teimum, sum hava víst á, at verandi tilbúgvingarskipan er als ikki nøktandi, um eitt óhapp skuldi hent einum av teimum stóru ferðamannaskipunum, sum vitja um summarið. Tingformaðurin sigur við KNR, at tað er alneyðugt hjá grønlendingum og dønum at taka álið í álvara, tí at eitt óhapp við fleiri túsund ferðafólkum hevði verið ein vanlukka fyri Grønland og grønlendsku ferðavinnuna.



# Prestar frí sunnudag

Í mong ár hava danskir prestar kært seg um ov langa arbeiðsviku og ov lítla frítíð. Nú er avgjørt at gera eina roynd at lata prestarnar í nøkrum próstadømum í Jyllandi arbeiða fimm dagar um vikuna og at geva teimum frí fjórða hvørt vikuskifti. Fyrimyndin er úr Noregi, har prestarnir hava havt fimm dagar arbeiðsviku í fleiri ár, og endamálið við royndini er at geva verandi prestum betri umstøður og at tryggja donsku kirkjuni prestar í framtíðini.

# Uppsagnarmál mangan torfør

**Eitt av truplastu málunum, sum Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur við at gera, eru uppsagnarmál, sum kunnu vera drúgfør og tíðarkrevjandi**

FSN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Eyðstein Djurhuus er sum formaður í fulltíðarstarvi hjá FSN*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Eitt av málunum á skránni á aðalfundi hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag fríggjadagin var val av seks nevndarlimum at sita í eitt tveyára skeið. Teir, sum vórðu valdir á fundinum, vóru Ellintur M. Abrahamsen, Regin Nónstein, Jákup Gøte, Jan Kristoffersen, Harry á Lakjuni og Ólavur Biskopstø. Teir, sum frammanundan sita í nevndini, eru Eyðstein Djurhuus, sum er formaður, Jóhannes Jacobsen, Dan Ingi Andreasen, Heðin Isaksen og Dánial Jákup Jørgensen.

### Fulltíðarstarv

Á aðalfundinum legði formaðurin fram frágreiðing um tað arbeiði, sum felagið hevur tikist við seinasta árið. Frágreiðingin hevur verið til viðgerðar á nevndarfundi í felagnum, og tað merkir, at øll nevndin stendur aftanfyri ársfrágreiðingina.

Starvið, sum formaður hjá skiparum og navigatørum, gjørdist fulltíðarstarv eftir aðalfundin í 2006.

- Nývalda nevndin metti, at rættast var at seta formannin í fulltíðarstarv, og teir fyrstu nevndarfundirnir í 2007 vórðu brúktir til at finna hóskandi arbeiðslýsing og løn fyri formansstarvið.

Eyðstein Djurhuus segði, at í 2007 hevur formaðurin soleiðis verið í føstum starvi á skrivstovu felagsins.

- Dagliga venda limir sær til felagið við ymiskum málum. Hóast tú ikki altíð kanst svara øllum fyrispurningum, so hevur tað stóran týdning, at felagið hevur ein persón, sum er tøkur, helt hann fyri.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur nevndarsessir í fiskivinnuráðnum, samstarvsráðnum, sjóvinnuráðnum og útbúgvingarráðnum og umframt luttøku á fundum í hesum ráðum, hevur formaðurin eisini luttikið á fundum og tiltøkum, har mett hevur verið, at felagið eigur at vera við.

### Trupul mál

Í byrjanini av frágreiðing síni vísti formaðurin á, at eitt av truplastu málunum, sum felagið hevur við at gera, eru uppsagnarmál.

- Ofta er ógreitt, hvat avtalað er, og uppsagnir eru mangan munnligar. Hesi mál eru drúgfør og tíðarkrevjandi, og málini hava mangan persónligan týdning fyri limirnar, segði Eyðstein Djurhuus.

# - Vit mugu taka umh

**Dagliga hoyra vit um oljudáking, tá ið skip bunkra, og orsøkin sigst vera líkasæla og mistøk hjá skipara og manning. Eisini henda spurningin tók formaðurin í Føroya Skipara-og Navigatørfelag upp á aðalfundi felagsins fríggjadagin**

FSN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vernd av havumhvørvinum er eitt mál, sum hevur verið nógv frammi í seinastuni.

- Okkara felag eigur at hava eina hugsan um hesi viðurskifti. Limir okkara hava revsirættarliga ábyrgd fyri, at lógir og kunngerðir verða hildnar. Tískil mugu skiparar og stýrimenn taka umhvørvisvernd í álvara.

Á aðalfundi hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag tók formaðurin, Eyðstein Djurhuus, henda spurning upp.

Hann segði, at um skiparar og stýrimenn ikki fylgja reglunum, kunnu hesir elva sær sjálvum og reiðarum stórt fíggjarligt tap.

### Neyðugt samstarv

Eyðstein greiddi frá, at føroysku havnirnar eru farnar at taka ímóti burturkasti frá skipum, og fatanin hjá FSN er, at henda skipan virkar toluliga væl.

- Ein nýggj kunngerð er ávegis sum ásetir, hvussu havnirnar skulu skipa innsavningina.

Í hesum sambandi heitti FSN-formaðurin á øll sjófólk um at samstarva væl við havnirnar.

- Fiskiveiðieftirlitið hevur eftirlit á sjónum og kannar, um burturkastið verður goymt umborð.

Hann vísti á, at dagliga hoyra vit um oljudálkingar, tá ið skip bunkra, og orsøkin sigst vera líkasæla og mistøk hjá skiparum og manning.

- Vit hava yvirfyri myndugleikunum víst á, at skipini eru soleiðis innrættað, at tað nærum er ógjørligt at fyribyrgja yvirbunkring. Tí ynskja vit, at krøv verða sett skipunum um, at øll yvirflot og luftrør skulu savnast í ein tanga.

Eyðstein segði, at hóast skiparin hevur ábyrgdina av bunkringini, hevur hann lítið tamarhald á – og í mongum førum - lítlan kunnleika um bunkringina.

### Saknar orðaskifti

- Fiskiskipaflotin brúkar nógva olju og hevur harvið stórt útlát av $CO_2$. Enn eru ongar aðrar orkukeldur møguligar til skipini.

Hann vísti á, at krøv fara í framtíðini at verða sett okkum um at minka um útlátið, men enn hevur lítið orðaskifti verið um, hvussu vit í Føroyum kunnu minka um útlátið.

- Núverandi fiskivinnupolitikkur ger, at skipini mugu fyri tað mesta royna á ytru fiskidagaleiðini, og bestu fiskileiðirnar eru stongdar fyri at verja fiskastovnarnar.

Eyðstein segði, at hesin politikkur førir til økta oljunýtslu og má endurskoðast.

- Tað er ikki nóg mikið bert at minka um skipatalið og fiskidagarnar. Skipini mugu fáa loyvi at royna, har fiskurin er.

Hann helt, at onnur tiltøk helst kunnu setast í verk til tess at verja fiskastovnarnar móti ovurveiði.

- Vit sakna eitt orðaskifti um, hvussu vit taka hesa avbjóðing, legði hann



aftrat.

### Veðurlagsbroyting

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag vísti á, at veðurlagsbroyt-

# Reiðarar standa ikki mát

**Føroyskir Fiskimenn Uttanlands eru misnøgdir við handfaringina hjá Tolli & Skatti av samdøgurfrádráttinum, sum teir meta verður umsitin ov tilvildarliga**

FFU
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands (FFU) hevði aðalfund fríggjadagin, har sitandi nevndin varð afturvald. Í nevndini eru Jógvan Fagraklett, formaður, Kollafjørður, Høgni W. Høgnesen, Toftir og Johan Joensen, Hoyvík.

Á fundinum vóru ymisk mál til umrøðu.

- Serliga var tað málið um samdøgurfrádráttin, sum fekk umrøðu. Menn eru misnøgdir við handfaringina hjá Tolli & Skatti av hesum máli, tí vit meta, at mismunur verður gjørdur. Ymiskt er, hvør fær henda frádrátt, og eisini verður munur gjørdur á, hvar í landinum tú býrt, sigur Høgni W. Høgnesen, nevndarlimur.

Hann vísir á, at FFU fylgir við og stuðlar einum av limum sínum, sum hevur fingið viðhald hjá kommunalu skattakærunevndini og landsskattanevndini. Málið er reist í Føroya rætti, har tað kemur fyri í komandi ári.

Høgni sigur, at talan er eisini um onnur skattamál sum koyra - og okkurt er á veg.

- Úttalilsini hjá Føroya Reiðarafelag um okkara luttøku í oljuni hjá skipunum eru ikki í samsvar við veruleikan.

Hann sigur, at flestu av limunum í FFU fáa eina mánaðarløn, og við ársenda verður árið avroknað.

- Vit meta ikki, at føroyskir reiðarar eru á sama støði sum teir, ið teir vilja sambera seg við. Reiðarar í útlandinum, sum vit sigla hjá, hava eisini ferðútreiðslur og uppihald í samband við ferðing at bera. Hetta er ein meirútreiðsla, sum teir hava, leggur Høgni W. Høgnesen aftrat.